# Risaskip byggjast uppaftur størri

**Kombineraða nóta-og trolskipið, Jupiter, sum gøtumenn keyptu úr Skotlandi tíðliga í heyst, fer til Pólands, 10. desember, har skipið verður longt við stívliga 10 metrum. - Í dag lastar Jupiter 1.300 tons, men eftir leingjanina fer skipið at lasta 2.000 tons, sigur reiðarin, Atli Hansen**



*Nú verður Jupiter longdur á somu skipasmiðju í Pólandi, sum gjørdi Krúnborg til eitt av størstu skipum av hesum slagi um okkara leiðir*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*

PELAGISKA VINNAN
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Nóta- og trolskipið, Krúnborg, er nýliga komið aftur úr Pólandi, har skipið er longt við sløkum 8 metrum sum ger, at skipið nú lastar 3.200 tons í mun til tey 2.500 tonsini, sum skipið lastaði frammanundan. Eftir leingjanina, telist Krúnborg nú millum størstu skip av hesum slagi um okkara leiðir.

Um stutta tíð fer eisini skipið, sum gøtumenn keyptu úr Skotlandi tíðliga í heyst, Jupiter, til Pólands, har 10 metrar skulu setast upp í.

Atli Hansen, reiðari, sigur, at í løtuni eru samráðingar við póllendingar um seinastu detaljurnar, og hann væntar, at Jupiter fer úr Føroyum, 10. desember.

– Sambært sáttmálanum verður skipið líðugt í Pólandi seinast í februar komandi ár.

### Stór skip, men ov lítil kortini…

Reiðarin sigur, at Jupiter í dag lastar 1.300 tons, men eftir leingjanina fer hann at lasta 2.000 tons.

Jupiter er 57,7 metrar langur og 12,5 metrar breiður.

– Gálgarnir, sum í dag standa frammi við skipssíðuna, skulu setast aftur á hekkuna, og í hesum sambandi verður hekkan bygd slakar tveir metrar aftur úr skipinum.

Hann sigur, at sektiónin upp á stívliga 10 metrar, sum sett verður upp í skipið, verður gjørd á aðrari skipasmiðju enn henni, sum fer at seta hana upp í skipið.

– Leingjanin verður framd á somu skipasmiðju, Gryfia-skipasmiðjuni, sum setti teir sløku átta metrarnar upp í Krúnborg.

Atli sigur, at flestu av teimum gomlu nótabátunum vórðu longdir miðskeiðis í áttatiárunum, og tí er tað einki nýtt, at hesi skip verða longd.

– Soleiðis var eisini gamli Jupiter, sum var undan hesum, longdur við eini 10 metrum, áðrenn vit keyptu skipið. Reiðarin væntar, at arbeiðið, sum gerast skal í Pólandi, helst fer at kosta niðanfyri 10 miljónir krónur.

– Tað var við í projektinum, tá ið vit keyptu Jupiter, at skipið skuldi leingjast. Um hetta ikki var við í ætlanini, høvdu vit heldur keypt eitt størri skip, tí sum svartkjaftabátur er hann ov lítil.

Hann vísir á, at einki skip hevði kláråð seg bert við svartkjaftinum – uttan so, at ein øgilig rúgva hevði verið at fingið av svartkjafti.

### Minni svartkjaftur

Um gongdina annars, síðan Jupiter fór til fiskiskap, sigur Atli Hansen, at hon hevur verið á eini leið.

– Men tá ið tú keypir eitt brúkt skip, er altíð okkurt, sum tú hevur hug at broyta.

Hann væntar, at tá ið skipið kemur aftur úr Pólandi seinast í februar, fer rættilig gongd at koma á.

– Øll nóta-og trolskipini eru í løtuni á svartkjaftaveiði norðanfyri, og hetta er triðji túrurin, sum Jupiter ger í føroyskum sjógvi. Fiskiskapurin hevur verið smáligur, bæði í summar og fyrrapartin av heystinum, men nú er líkt til, at hann er heldur frægari, tó at hann einki er at reypa av enn, sigur Atli Hansen, reiðari.

Jupiter fór fyrsta túrin, 26. august, og meginpartin av tíðini hevur skipið verið á svartkjaftaveiði. Í einar 3-4 vikur vóru teir á makrelveiði.

Skiparar eru Martin Petersen, sum býr á Kambsdali og Emil Petersen, sum býr í Kollafirði. Við skipinum hvønn túrin eru 12 mans, men tilsamans 18 mans eru knýttir at Jupiter, sum P/F Driftin í Gøtu eigur.



*- Tað var við í projektinum, at Jupiter skuldi leingjast. Ætlaðu vit ikki at leingja skipið, høvdu vit heldur keypt eitt størri skip, tí sum svartkjaftabátur er Jupiter ov lítil, sigur Atli Hansen, reiðari*
*Mynd: Vilmund Jacobsen*

# Minni svartkjaftur í føroyskum sjógvi

**– Tað er tankavekjandi, at so lítil svartkjaftur hevur verið at fingið í føroyskum sjógvi í summar og í heyst, sigur Atli Hansen, reiðari, sum stúrir fyri, at svartkjafturin kann fara at minka, nú veiðan hjá strandalondunum, sum varða av svartkjaftinum, er so stór og óskipað**

PELAGISKA VINNAN
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Strandalondini, sum varða av svartkjaftinum, eru enn ikki samd um, hvussu svartkjafturin skal býtast millum londini.

Útrokningar hjá ICES vísa, at ein gongd leið kundi verið at fiskað 1,5 miljónir tons í eini 2-3 ár og síðan lækkað heildarkvotuna niður í 1 miljón tons.

Samlaða veiðan í íslendskum sjógvi, føroyskum sjógvi, norskum sjógvi, ES-sjógvi og í altjóða sjógvi í fjør var heili 2,3 miljónir tons, og veiðan higartil í ár er farin um tær 2 miljónir tonsini.

Fiskifrøðingar meta, at veiðan er alt ov stór í mun til, hvat mett verður, at svartkjaftastovnurin tolir.

Fundir hava verið í heyst millum strandalondini, men hesir eru endaðir úrslitaleysir.

### Tankavekjandi

Atli Hansen, reiðari á Jupiter, heldur tað vera tankavekjandi, at svartkjaftaveiðan í føroyskum sjógvi hevur verið so vánalig í summar og í heyst.

– Tað er sjálvandi ilt at siga, hvussu gongdin verður, og í seinastuni hevur heldur meira verið at fingið - tó at hetta einki er at tosa um.

Hann stúrir fyri, at orsøkin til minkandi veiðina inn kann hava samband við stóra veiðitrýstið sum stendst av, at strandalondini ikki kunnu semjast um eina heildarkvotu og býtið av henni.

– Tað vísir seg, at nógv minni hevur verið at fingið av svartkjafti allastaðni – og ikki bara í føroyskum sjógvi. Hetta er tankavekjandi, heldur hann.

Reiðarin vísir á, at svartkjaftur er eitt lutfalsliga bíligt fiskaslag, og hóast nógv hevur verið at fingið undanfarin ár, er svartkjaftur in einsamallur ikki nóg mikið at liva av hjá pelagiska flotanum.

– Hækkaðu oljuútreiðslurnar og minni fiskiskapur gera tað munandi minni lønandi at royna eftir svartkjafti, soleiðis sum støðan er.

### ICES ella OPEC?

Hann vísir á, at leiðarin á Fiskirannsóknarstovuni, Hjalti í Jákupsstovu, í blaðsamrøðu helt fyri, at kanska verður tað OPEC, sum kemur at tálma svartkjaftaveiðini, um strandalondini ikki kunnu finna út av at gera tað sjálvi.

– Soleiðis, sum svartkjaftaveiðan hevur verið í summar og í heyst, er ikki óhugsandi, at hesin spádómur kann gerast rættur, sigur hann.

Atli Hansen sigur, at pelagisku skipini helst skulu fiska fyri einar 40-50 miljóni krónur um árið, um tey skulu bera seg, og skal hesin peningur tjenast við svartkjafti, er neyðugt, at hvørt skipið fiskar eini 80.000 tons í part.

– Pelagisku skipini brúka einar 3-4 miljónir litrar av olju um árið, og nú oljuprísurin er øktur við meira enn einari krónu fyri litrin, merkir hetta eina eykaútreiðslu uppá somuleiðis 3-4 miljónir krónur. Tað er ikki lítið, sigur reiðarin, sum sjálvsagt vónar, at góði svartkjaftafiskiskapurin, sum verið hevur seinastu árini, fer at taka seg uppaftur.

Men hesum er eingin vissa fyri.



**Faroe Islands' largest supplier to the industry**

**Packaging from carton, corrugated paper, massive paper, plastic and other materials for all industrial purposes.**

*We also supply:*
Plastic products • Packaging equipment • Machines • Fork-lifts
Working clothes • Safety equipment • Knifes • Admixtures • Sacks
Pallets • Detergents/Cleaning
*We offer advice in design on packaging materials*

...off course to the best price!!!

P/f Farpack was founded in 1994 by some of the largest companies in the Faroese fishing industry, and we are the largest supplier of packaging materials etc. to the industry in the Faroe Islands.

We are ISO-9000:2000 approved.

We are situated in good rented facilities in Tórshavn, and our staff are at your disposal 24 hours a-day all year round.

We are able to take care of all your requirements, such as costums clearances, warehousing and logistics.




Staravegur 5 • P.O. Box 3099
FO-110 Tórshavn
Telefon 35 30 00
Fax 35 30 10
E-mail: farpack@farpack.fo
www.farpack.fo




**Sosialurin**
Lesið Sosialin
-tað loysir seg!